## El-drivnir hýruvognar í Tokyo

Amerikanska fyritøkan Better Place, sum hevur til endamál at minka um globalu brúki av olju og at innføra ein infrastruktur við elbilum, er nú farin í samstarv við japonsku stjórnina um eitt pilotprojekt við el-drivnum hýruvognum í Tokyo. Talan er um fyrsu verkætlan av sínum slagi, har hýruvognarnir verða útgjørdir við battariskiftitøknini hjá Better Place. Hóast talið av hýruvognum bert er tvey prosent av øllum persónbilunum í Japan, standa hýruvognarnir fyri umleið 20 prosentum av samlaða $CO_2$-útlátinum. Bara í Tokyo eru umleið 60.000 hýruvognar. Battarískiftistøðir vera í løtuni settar upp, og tað er størsta hýruvognsfyritøkan í Tokyo, Nihon Kotsu, ið kemur at samstarva við Better Place um verkætlanina, sum eftir ætlan byrjar í januar 2010.



# Leirvíkingar eru syndabukkar

**Borgarstjórin í Eysturkommunu, Jóhan Christiansen, sigur, at kommunan hevur verið fullgreið yvir og hevur gjørt vart við, at íløgukarmurin upp á 40 miljónir krónur fór ikki at halda. – Nú verða leirvíkingar gjørdir til syndabukkar í hesum leiki, sigur Jóhan Christiansen, borgarstjóri í Eystur kommunu**

LEIRVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Tað almenna segði seg ikki hava ráð at gera vegin í góðum tíðum, og nú tað eru verri tíðir búskaparliga, verða vit av landsins myndugleikum gjørdir til nøkur grenj, sigur Jóhan Christiansen, borgarstjóri í Eysturkommunu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Jóhan Christiansen, borgarstjóri í Eysturkommunu, sigur, at Leirvík kann ikki geva frá sær bátahyl, parkeringspláss og atkomuvegir umframt aðrar tænastur, sum borgararnir í Leirvík hava frammanundan – og einki fáa afturfyri.

- Longu áðrenn verklagslógin varð samtykt á tingi, vístu vit á, at íløguætlanin upp á 40 miljónir krónur fór ikki at halda.

Jóhan Christiansen sigur, at bygdaráðið fyri umleið tveimum mánaðum samtykti einmælt, at krøvini, sum Leirvíkar kommuna áður hevur sett, skulu fylgjast.

Borgarstjórin dugir onga sum helst meining at síggja í, at leirvíkingar ikki fáa endurgjald fyri tað, sum bygdin missir við ætlaðu linjuføringini í sambandi við hesa vegagerð.

### Syndabukkar

- Tað almenna segði seg ikki hava ráð at gera henda vegin í góðum tíðum, og nú tað eru verri tíðir búskaparliga, verða vit av landsins myndugleikum gjørdir til nøkur grenj.

Borgarstjórin endurtekur, at tey longu áðrenn verklagslógin varð samtykt vendu sær til landsins myndugleikar og enntá til hvønn løgtingslim sær – um hann minnist rætt – og gjørdu vart við, at íløguætlanin ikki fór at halda.

- Nú tað er vorðið greitt, at íløguætlanin ikki fer at halda, og vit hava endurtikið okkara rímiligu krøv um endurgjald, er líkt til, at málið aftur stendur í botni – og einki hendir. Tí kenna vit tað soleiðis, at tað eru leirvíkingar, sum enn einaferð eru gjørdir til syndabukkar í hesum annars so átroðkandi máli, sigur Jóhan Christiansen, borgarstjóri í Eysturkommunu.

# Samgongan ikki sinnað at hækka íløgukarm

**Annika Olsen, landsstýriskvinna, sigur, at samgongan er ikki sinnað at hækka íløgukarmin í sambandi við vegagerðina í Leirvík, og tí liggur alt í løtuni í óvissu um, hvussu verður við hesi verkætlan**

LEIRVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stýgur er av álvara komin í ætlanina at byggja vegin í Leirvík, sum skal føra ferðsluna úr Norðoyatunlinum gjøgnum Leirvíkar bygd og niðan í Leirvíkartunnilin.

Tíðindini bórust, tá ein arbeiðstakari, sum Sosialurin hevur samrøðu við í blaðnum í dag, lat okkum vita, at teir, sum høvdu lægsta boð við lisitatiónina á Landsverki hin 11. juni í ár, enn einki endaligt hava frætt um, hvussu verður og ikki.

Í aðrari grein í blaðnum í dag sigur stjórin í Landsverki, Oyvindur Brimnes, at verklagslógin, sum løgtingið hevur samtykt við einum íløgulofti upp á 40 miljónir krónur, fer ikki at halda.

Hann sigur, at verkætlanin við teimum krøvum um endurgjald fyri eitt nú verri bátahyl, mist parkeringspláss og onkran atkomuveg í Leirvík fer at tátta í 50 miljónir krónur.

- Tí verður neyðugt hjá landsstýriskvinnuni, Anniku Olsen, at fara aftur í løgtingið við verklagslógini, sigur stjórin í Landsverki.

### Støðan fastløst

Annika Olsen, landsstýriskvinna, ásannar, at málið við leirvíkarvegnum er steðgað upp, nú tað vísir seg, at neyðugt verður við meira enn teimum 40 miljónum krónunum, sum samtyktar eru í verandi verklagslóg.

- Eg havi reist málið í samgonguni, men havi ikki fingið undirtøku fyri, at íløgukarmurin verður øktur. Hetta málið harmar meg ógvuliga nógv, men sum er, er ikki líkt til, at eg kann røkka á mál í samgonguni. Tí nyttar heldur einki at fara í løgtingið við málinum, sigur hon.

Annika Olsen sigur seg vóna, at Landsverk og Eysturkommuna onkusvegna kunnu koma ásamt um eina verkætlan við vegnum gjøgnum Leirvíkar bygd, sum ger, at hendan verður innanfyri galdandi íløgukarm.



*Annika Olsen, landsstýriskvinna*